# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## FØÐINGAR

Vi har fått en perfekt liten gutt på 3420 g og 49 cm. Sven-Andrew vil gjerne sende en hilsen til familie og venner på Færøyene. Foreldre: Sissal B. Hansen og Tom-Viggo Vårdal. Ole Vigsgate 23, Moss i Norge. Født: 5. mai kl. 09:41

*FOTO: DAGFINN KRISTIANSEN*



Tann 13. februar fingu Zaina Christensen, Ålborg og Sunleif Danielsen, Tórshavn henda fitta drongin. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3000 gr. Tey búgva í Ålborg.



1. mai fingu Naina og Dánial Jespersen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4300 gr.

2. mai fingu Drós Djurhuus og Trygvi Berg, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3300 gr.

2. mai fingu Annika Winther Klit og Karsten Klit, Lystrup í Danmark, eina gentu, ið vigaði 3950 gr. og var 52 cm. long.

3. mai fingu Annika Winther Klit og Karsten Klit, Lystrup í Danmark, eina gentu, ið vigaði 3950 gr og var 52 cm long.

4. mai fingu Beata Birk Jensen og Robert Glerfoss, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm. og vigaði 2800 gr.

5. mai fingu Guðrið Holm og Kaj Heri Joensen, Kvívík, eina dóttur. Honv ar 51 cm. long og vigaði 3800 gr.

7. mai fingu Rannvá H. Gásdal og Dánial Haraldsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3600 gr.

8. mai fingu Anna-May og Tummas Djurhuus, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

8. mai fingu Marjun og Heðin Poulsen, Vatnsoyrar, ein son. Hann var 54 cm. langur og vaið 3900 gr.

9. mai fingu Hjørdis J. HØjsted og Gunnar M. Greforiussen, Tórshavn, ein son. hann var 54 cm. langur og vigaði 3950 gr.

9. mai fingu AnnaMaria og Heðin á Lakjuni, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3250 gr.

9. mai fingu Finnbjørg Nattestad og Dann Tjørgaard Nielsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 3150 gr.

10. mai fingu Maud Elmarsdóttir og Mads Andrias Winther Olsen, Skála, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4500 gr.

10. mai fingu Ásla Heinesen og Jack H. Jacobsen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3150 gr.

11. mai fingu Laila og Bennie Højgaard, Fuglafjørður, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3100 gr.

12. mai fingu Erika Knudsen og Karstin Joensen, Skáli, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3800 gr.

## Dagurin

**15. mai. Halvarðsøka,** fyrr í tíðini eisini rópt halvarðsmessa, verður hildin til mnnis um Hallvarð, systkinabarn Ólavs hin heilaga. Halgisøgan sigur, at tá ið hann skuldi hjálpa einari konu móti yvirgangskroppum, varð hann sjálvur dripin og søktur í Drammensfjørðin við einum myllusteini um hálsin. Men líkið flotnaði og varð korsett í dómkirkjuni í Oslo. Hann doyði í 1042 og er verndarhalgimenni hjá býnum Oslo.
Navnið er norrønt og merkir *hella og verja.*

**16. mai. Sára.** Dagurin hevur navn eftir konu Ábrahams. Hebráiska navnið merkir *høvdingafrú.*
Í Írlandi verður dagurin hildin til minnis um Sankta Brenda, sum doyði í árinum 578.

**17. mai. Bruno,** deyður í 1045. Biskupur í Würtzburg, sum saman við mongum øðrum komst av døgum á eini ferð í Ungarn.
Navnið merkir *hin brúni.*

# Minningarorð um Sigvald Hentze Hvalba



Tung var náttin og tyngri tá lýsti, og boðini komu at stavurin var funnin.

Í besta veðri, og tá alt var byrjað at spretta, og fyrstu lombini vóru komin í bøin og nøkur í hagan, legði okkara góði vinur, Sigvald, árarnar inn.

Sporini vóru tald, og gekk hann tey síðstu, har hann kendi hvønn stein og hvørja túgvu.

Sigvald hevði stóran alsk til náttúruna, og var hann seyðamaður í fleiri ár í Heiðinum, og rakstrarmaður Uttan Knúka í 32 ár. Seyðurin var hansara eitt og alt, hann segði oftani, eftir at konan var deyð, at hevði hann ikki havt seyðin at fara til, so hevði mangan verið ringt.

Sigvald visti nógv og var sera hugnaligur maður. Dugdi væl at læra unga fólkið, hann hevði við sær í rakstri, og siga teimum ymiskt.

Serliga áhugavert var, tá raksturin var liðugur, og sitið var við búgvið borð, tá varð prátað og hegnisliga fekk hann ungu garparnir at lurta.

Serliga glaður var hann fyri, at hann í fyrrárið var í Lítlu Dímun og fleygaði og kundi síggja góðu umstøðurnar, unga fólkið hevði skapt sær úti í Oynni. Hann helt fyri, at betri frídagar kundi tú ikki fáa.

Tómligt er og verður, ein bygdarmynd er farin, og enn einaferð standa vit spyrjandi. Tað sum nú nívir er, at einki er at fara til, og vit mugu ásanna, at eingin veit á morgni ar siga, hvar hann á kvøldi gistir.

Sigvald var eisini ein av teimum, ið gekk har hann fór, og nógvir vóru túrarnir norður í Trøðina, og hóast hann var 69 ár, var hann av bestu gongumonnum, og væl dámdi honum at ganga.

Við hesum fáu orðum vilja vit her úr húsinum lýsa frið yvir Sigvald.

**Birgir**

Sosialurin
Sosialurin
í



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Sonja Hammer 60 ár



Mánadagin 17. mai fyllir Sonja Hammer í Syðrugøtu 60 ár.

Sonja, sum er gift Haraldi Hammer, lærara av Tvøroyri, er ættað úr Fuglafirði. Hon er dóttir Jokhild – betur kend sum Kittan, og Jógvan Andrias Poulsen. Kittan og Jógvan Andrias áttu umframt Sonju eisini Kára, Jónsvein, Jógvan Finn, og so vaks Hjørleif Hansen eisini upp í heimi teirra.

Sonja og Harald giftust 14. oktober í 1967, og tey eiga børnini Jónu, Jonhard og Meiken. Ommubørnini eru tvey í talið, Sonja og Johan.

Nýgift fluttu Sonja og Harald inn í læraraíbúðina í skúlanum við Gøtugjógv, har Harald framvegis starvast. Í 1971 bygdu tey í Syðrugøtu, har tey enn búgva.

Sonja tók preliminerprógv í Fuglafjarðar skúla, og fór eftir lokna útbúgving at starvast í handlinum hjá Pidda í Fuglafirði.

Hóast nógvur tónleikur hevur verið at hoyrt í heiminum hjá Kittuni og Jógvan Andriasi, so hevði hetta ikki Sonjusa áhuga. Av hennara frítíðarítrivum kunnu nevnast, at hon róði kapp við Erlu Kongsdóttir.

Sonja fór seinni á háskúla í Virum í Danmark.

Heimafturkomin starvaðist hon í City í Fuglafirði og í Keypsamtøkuni í Fuglafirði og í Havn.

Hon hevur starvast sum heimahjálp í 25 ár, og hevur nýliga gingið á heilsurøktaraskúlanum á Tvøroyri. Hon hevur eisini sitið í nevndini í Føroya Heimahjálparafelag.

Vit kunnu siga um Sonju, at hon hevur offrað ein stóran part av lívi sínum til tey eldru í bygdini. Hon hevur stríðst fyri at bøta um kor teirra, og var hon við til at arbeiða fyri umlættingarheiminum í Gøtu og var eisini við til at stovna Gøtubrá – felagið fyri eldri við Gøtugjógv.

Sonja hevur eisini verið ein hollur stuðul hjá nýggju kirkjuni í Gøtu til at savna pengar inn við bingo og øðrum. Eisini hevur hon gjørt eitt stórt arbeiði fyri losjuna Glottan og Gøtu Ítróttarfelag, har maðurin, Harald, var formaður í fleiri ár.

Sonja heldur føðingardagin mánakvøldið í heiminum í Syðrugøtu.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta samkenslu, sum okkum varð víst, tá kæri pápi, abbi og langabbi okkara

**Jóannes Olsen**
Hvalvík

doyði og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til tykkum heimasjúkrasystrar, heimahjálpir og kommunulæknar, sum vóru so væl um hann til tað seinasta. Eisini ein tøkk til tykkum á A3 og B5.
Tøkk til tykkum, sum vitjaðu inn á gólvið, og til tykkum, sum ringdu til okkum.
Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk fái øll tit, sum sendu gávu til Hvalvíkar kirkju og til Missiónshúsið í Hvalvík.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, gravarar, berarar og til tykkum øll, sum fylgdum honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til tykkum, sum tóku tykkum av ervinum eftir jarðarferðina, og annars tøkk til øll, sum hjálptu til í sambandi við jarðarferðina.

*Vegna tey avvarðandi*

**Helgi, Tummas,
abba- og langabbabørn**

Mary Hansen, Miðvágur:

## 25 ára starvsdag og prógv



Hósdagin 13. maj hevði ein av væl umtóktu heimahjálparunum, Mary Hansen úr Miðvági, 25 ára starvsdag í heimarøktini. Og ikki nokk við tað, henda sama dag fekk hon eisini prógv sum heilsuhjálpari á Heilsuskúla Føroya við góðum úrslitum.

Hesar seinastu mánaðirnar hevur hon verið í starvsvenjing á eldrasambýlinum Oman Hoydalar í Hoyvík , og hetta hevur dámt henni sera væl, serliga væl hevur henni dáma arbeiðið við dementum fólki.

Nú hon eftir 25 ára starvstíð endiliga hevur fingið prógv upp á hennara dugnaskap, vilja vit ynskja henni hjartaliga tillukku og vóna, at hon fer at klára 25 ár afturat í heimarøktini.

**x**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost:
**post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til:
**Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn**
**merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800**

Sosialurin